# Jóannes átalar Lars Emil

**Jóannes Eidesgaard, formaður í Føroya Javnaðarflokki, átlar, at grønlendski fólkatingsmaðurin, Lars Emil Johansen úr Siumut, útnevnir seg sjálvan til talsmann hjá Tjóðveldisflokkinum á Fólkatingi og harvið leggur seg beinleiðis út í innanhýsis føroysk viðurskifti**

ÁTALA
*Edvard Joensen*



*Jóannes Eidesgaard átalar, at grønlendski fólkatingsmaðurin, Lars Emil Johanen (myndin), blandar seg upp í føroyska sjálvstýrismálið sum talsmaður hjá Tjóðveldisflokkinum á Fólkatingi*

Í opnum brævi til grønlendska Siumut flokkin og Lars Emil Johansen, fólkatingsmann floksins, átalar Jóannes Eidesgaard, at Lars Emil Johansen leggur seg út í innanhýsis viðurskifti í Føroyum.

Tað er beinleiðis brot á altjóða sið, at leggja seg út í innanhýsis viðurskifti hjá einum øðrum landi, vísir Jóannes Eidesgaard á. Men tað er júst tað, Lars Emil Johansen ger, tá hann í samrøðu við Útvarp Føroya ger seg til talsmann hjá føroyska Tjóðveldisflokkinum á Fólkatingi.

Í samrøðu við Útvarp Føroya sunnudagin segði Lars Emil Johansen, at hann vildi vera talsmaður hjá Høgna Hoydal og Torbirni Jacobsen á Fólkatingi í málinum um sjálvstýri føroyinga mótvegis Danmark.

Í brævinum til flokkin og fólkatingsmannin sigur Jóannes Eidesgaard, at málið um føroyskt sjálvstýrið, sum Tjóðveldisflokkurin leggur tað fram á Fólkatingi, er eitt mál, sum kemur frá einum politiskum minniluta í Føroyum.

Tí undrar tað Førya Javnaðarflokk, at ein fólkatingsmaður fyri Siumut ger seg til talsmann fyri ein føroyskan minniluta.

Eisini vísir Jóannes Eidesgaard á, at danskir politikarar, seinast forsætisráðharrin Anders Fogh Rasmussen, ferð eftir ferð hava víst á, at hetta málið bara kann avgerast av føroyingum í Føroyum. Eisini hevur Fólkatingið tann 10. mai í ár næstan einmælt boðað frá, at hesi viðurskifti avgera føroyingar sjálvir.

Jóannes Eidesgaard endar brævið við at siga, at tað ørkymlar Javnaðarflokkin, at vit ikki í hesum máli kunnu halda ta kendu kósina, har vit í virðing fyri hvørjum øðrum lata vera við at blanda okkum upp í innanhýsis politiskar ósemjur í báðum londunum.






# Lars Emil tosar fyri egna rokning

**Almenni grønlendski politikkurin er, at føroyingar avgera sjálvir síni viðurskifti við Danmark, sigur Jonathan Motzfeldt, landsstýrisformaður**

VIÐMERKING
*Edvard Joensen*

Hevur Lars Emil sagt við Útvarp Føroya, at hann vil vera talsmaður hjá Tjóðveldisflokkinum á Fólkatingi, stendur tað fyri hansara egnu rokning, segði Jonathan Motzfeldt, landsstýrisformaður, tá Sosialurin bað um viðmerking til orðini hjá Lars Emil Johansen í Útvarpinum sunnudagin.

Hóast Jonathan Motzfeldt ikki sjálvur hevur hoyrt samrøðuna, sigur hann, at eingin ivi er um, at Lars Emil Johanen kennir almennu støðuna hjá bæði Siumut og grønlendska landsstýrinum, sigur Jonathan Motzfeldt.

– Eg havi fult álit á, at føroyingar sjálvir klára síni viðurskifti við Danmark, og vit fara ongantíð at blanda okkum í, hvussu teir gera tað, sigur grønlendski landsstýrisformaðurin í viðmerking við Sosialin.

Lars Emil Johansen veit eisini, sigur Jonathan Motzfeldt, at í Grønlandi situr ein arbeiðsbólkur og arbeiðir við eini sjálvsstýrislýsing, sum verður klár at viðgera í Landstinginum komandi ár. Og eg eri vísur í, at sami andi mótvegis øðrum londum, eitt nú Føroyum, eisini fer at vera galdandi har, sigur hann.

Hjá okkum er als eingin slingur í valsinum, undirstrikar grønlendski landsstýrisformaðurin.

Vit royndu at fáa viðmerking frá formanninum í Siumut, Hans Enoksen, men hann var ikki at hitta.



*Grønlendingar fara ongantíð at blanda seg upp í viðurskiftini millum Føroyar og Danmark, sigur Jonathan Motzfeldt, grønlendskur landsstýrisformaður*









